# at siga

## Slapp av við sjóverkin

Agnar Nielsen hevur roynt mangt og hvat í sínum langa lívi, og hevur verið virkin bæði á sjógvi og landi. Hann hevur brúkt nógv tíð innan kirkju og missión og aðrar felagsskapir.

Hann hevur millum annað verið løgtingsmaður í samfull 20 ár, og var har løgtingsformaður í tvey tíðarskeið.

Sum ungur var Agnar sera ringur av sjóverki. Men nú er tað fullkomuliga burtur.

- Nú kann rulla, sum tað rulla vil. Eg merki so einki til nakað sjóverk.

- Ja, tað er fantastiskt at kunna njóta sjólívið uttan at skula hugsa um sjóverkin allatíðina, greiðir Agnar frá.

*Tá hemarin hevur bitið á, lati eg hann bara arbeiða ímóti boyuni eina góða løtu – kanska upp í ein hálvan tíma ella so*



*Hemarin ferðast víða - úr Barentshavinum til Vesturafrika, í Norðsjónum, Miðjarðarhavinum, og hann finst eisini við Ísland og bretsku oyggjarnar. Við Kirkjubønes og í Mykinesfirði finnast teir eisini*

*Agnar hevur ein góðan norskan bát, og innanborða her hevur hann drigið mangar hemarar hesar báðar seinastu vetrarnar*



*Nú kann rulla, sum tað rulla vil. Eg merki so einki til nakað sjóverk. Ja, tað er fantastiskt at kunna njóta sjólívið uttan at skula hugsa um sjóverkin allatíðina*

*Hemari er uppsjóarfiskur, og ferðast úr vatnskorpuni og niður á 700 metrar, tó sjáldan djúpari enn 150. Hann kann verða upp ímóti metrum til longdar*

